## Ætla veðurlagsgrunn

Altjóða Gjaldoyragrunnurin IMF ætlar sær at stovna ein stóran grunn, sum skal hjálpa fátækum londum at menna samfelagið á ein burðardyggan hátt og at standa ímóti ávirkanini av veðurlagsbroytingunum. Stjórin í IMF, Dominique Strauss-Kahn, segði á altjóða búskaparráðstevnuni í Davos í gjár, at grunnurin skal hava 100 milliardir dollarar ella einar 533 milliardir krónur í stovnsfæi. IMF-stjórin segði, at tey fátæku londini hava ikki figgjarliga orku til avbjóðingarnar av veðurlagsbroytingunum og mugu tí fáa stuðtl frá altjóða samfelagnum.

## Øskan á sjógvin

Umleið 200 fólk vóru komin saman nærhendis strondini við suðurafrikanska býin Durban í lýsingini leygarmorgunin. Orsøkin var, at eftirkomarar hjá indisku frælsishetjuni Mahatma Gandhi høvdu gjørt av koyra nakað av øsku hansara á sjógvin. Reuters skrivar, at ein abbasonur Gandhi stroyddi øskuna út yvir sjógvin. Mahatma Gandhi varð myrdur tann 30. januar í 1948. Eftir gomlum siði varð líkið brent. Í India er vanligt at koyra øskuna í eina á, men eftirkomararnir hjá Gandhi valdu at lata fleiri av vinum hansara kring heimin fáa øskuna. Ein partur fór til Suðurafrika, og tað var tann øskan, sum bleiv koyrd á sjógvin har leygarmorgunin.

# Biðja politikararnar um hjálp at basa smugling

**Vit hava góð amboð at basa rúsevnasmugling, men vit hava eitt stórt ynski um at fáa eitt amboð afturat, men tað kunnu vit bert fáa við politiskari hjálp, sigur narkoløgreglumaður í Havn**

RÚSEVNI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tey, sum royna at smugla rúsevni til Føroya, hava gott hugflog, men løgreglan saknar eitt sindur av hjálpt frá politiska myndugleikanum fyri at verða enn betri før fyri at basa smuglingini*

- Sum heild haldi eg, at vit eru hampiliga væl fyri at berjast ímóti rúsevnasmugling til Føroya.

Tað heldur Brynjer Johannesen á narko-deildini hjá løgregluni í Føroyum.

Umframt vanligt tolleftirlit, hevur løgreglan eisini ein narkohund og tollvaldið hevur tveir og teir verða mettir at vera í serflokki.

Men nýliga hevur hava tey eisini fingið atgongd til ferðafólkalistarnar hjá Norrønu og Atlantsflogi.

- Tað var eitt stórt frambrot, tá ið vit fingu atgongd til ferðafólkalistarnar, sigur Brynjer Johannesen.

Hann sigur, at tað hevur avdúkað rættiliga nógva smugling, tí tá fáa tey fylgt við, hvør ferðast og hvussu ferðamynstrið hjá fólki er.

- Hava vit illgruna til ávís fólk, kunnu vit fylgja við hvar tey ferðast og, hvussu ofta, tey ferðast og tað hevur avdúkað rættiliga nógv.

### Sakna politiska hjálp

Men løgreglumaðurin á narkodeildini sigur, at ovast á ynskilistanum hjá teimum beint nú, stendur at fáa betri umstøður á teleøkinum.

Men eins og smuglarar altíð royna at vera eitt fet frammanfyri løgregluna, roynir løgreglan eisini at vera eitt fet frammanfyri smugglarnarnar.

Tí kemur Brynjer Johannesen ikki nærmari inn á, hvat hann hugsar um.

Men hann sigur, at á teleøkinum hevur løgreglan nakrar heimildir, men teir mangla eisini nakrar møguleikar.

- Men teir møguleikarnir kunnu tey bara fáa við politiskari hjálp, tí tað kostar eitt sindur av pengum, men talan er á ongan hátt um upphæddir, sum nakar átti at ræðst.

Hvussu nógv, tað kostar, dugir hann kortini ikki at siga.

- Men hetta skal eisini setast upp ímóti, at hvør einasti misbrúkari kostar samfelagnum milliónir í viðgerðum av ymsum slagi og tí at hann allarhelst heldur ikki er virkin á arbeiðsmarknaðinum og sostatt ikki betalir skatt ella á annan hátt gevur sítt ískoyti til samfelagið.

- Teleøkið er ógvuliga tungt at fáast við og tí vildu vit ómetaliga fegin havt betri møguleikar á tí økinum.

- Og politikararnir vita, hvat vit hugsa um og eg haldi, at hetta er eitt mál, sum vit noyðast at loysa fyri at gera løgregluna nógv betri føra fyri at kanna rúsevnamál.

Brynjer Johannesen sigur, at hetta hevði verið ein íløga, sum hevði betalt seg aftur fleiri ferðir.

- Politikarar gera javnan vart við, at stórur dentur skal leggjast á stríðið ímóti rúsevnum og at tað skal raðfestast. Tí vildi eg avgjørt viðmælt, at teir hjálptu okkum við teimum avmarkingum, vit hava á teleøkinum, sigur Brynjer Johannesen.

# Át 80 hítir við hassji upp á fimm tímar

**Tey, sum smuggla rúsevni strekkja seg rættiliga langt í royndunum at lumpa tollvald og løgreglu og hugflogið er gott**

RÚSEVNI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

- Tey, sum smuggla rúsevni royna alla tíðina at verða eitt sindur frammanfyri okkum, sum royna at avúka tey.

Tað má Brynjer Johannesen á narkodeildini hjá løgregluni í Havn bara staðfesta.

Hann sigur, at seinasta rákið er bæði mannfólk og konufólk eru farin at smuggla rúsevni innvortis.

Eitt fyribrigdi, sum verður vanligari og vanligari, er, at rúsevni verða pakkað í hylki, sum eru í kindereggum, sum mannfólk og konufólk síðani stinga upp í seg.

Løgreglumaðurin sigur, at um so er, at hetta er ein roynd at sleppa undan at narkohundarnir skulu uppdaga nakað, er tað til fánýtis

- Eisini hetta slagið av smuggligt uppdaga narkohundarnar og teir gera eina týðiliga markerking um, at okkurt er áfatt, sum gevur okkum nóg stóran illgruna til, at vit kanna hesi fólkini nærri.

### Át 80 hítir við hassji

Hinvegin hevur løgreglan og tollvaldið eisini varnast, at smugglarar hava pakkað smáar nøgdir av rúsevnum í hítir og hava svølgt tað og so fer tað ígjøgnum alla sodningarskipanina og út aftur hinumegin.

- Tann síðsti smugglarin vit tóku, sum hevði svølgt rúsevni, hevði svølgt 80 hylki av rúsevnum, har smáar nøgdir á støðd við eina pinocchiokúlu, varð pakkað inn í hítir og svølgt.

Smugglarin var farin upp klokkan sjey á morgni, men ikki fyrrenn fimm tímar seinni, klokkan 12 á miðdegi, hevði hann fingið svølgt tað síðsta hylki, so tað kann ikki sigast annað, enn at hann arbeiddi fyri sakini.

### Stórt persónligt inntriv

Men verða rúsevni smugglað innvortis, noyðist løgreglan at gera tað, sum Brynjer Johannesen kallar eitt rættiliga stórt persónligt inntriv á likamið hjá fólki, tí tá skulu tey í skannara og til undirlívskanninar og aðrar læknakanningar fyri at finna rúsevnini.

Løgreglumaðurin sigur, at er talan um sterk rúsevni, sum verða svølgd, er tað at spæla russiska roulettu, tí tað er við lívinum í veð.

- Hendir tað seg, at ein hít skrædnar í maganum, stendur lívið næstan ikki til at bjarga, sigur Brynjer Johannesen.